## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Álvur Klakk 70 ár



Týsdagin 3. januar fylti Álvur Matras Klakk í Klaksvík 70 ár. Álvur er keypmaður, og hann hevur eisini á so mangan annan hátt verið við til at mynda heimstaðin.

Foreldrini vóru Sigurd Klakk, sum var ættaður úr Klaksvík, og Anna Malena fødd Matras og ættað úr Follindi á Viðareiði. Tey fingu trý børn. Álvur er elstur. Kirstin Matras, sum er fødd í 1938, giftist niður til Suðurjyllands, har hon tey fyrstu árini var bóndakona, og Odny Matras, sum er fødd í 1941, giftist yvir til Seattle í USA.

Álvur hevur verið í handilsumhvørvinum alla sína tíð. Abbin, Óli í Skúla, fór at handla í 1904 í hølunum, sum í Klaksvík verða nevnd hjá Óla Gaard. Seinni flutti hann út í Klaksvík, har teir frá fyrst í tríati árunum eisini høvdu mjólkavirkið, sum nevndist Norðoya Mjólkafelag. Har var eisini avgreiðslan hjá Smyrli. Bæði pápi og pápabeiggi Álv vóru í fyritøkuni.

Í 1958 fór Álvur at starvast í krambúðini hjá J. Michael Jacobsen heimi í Vági. Har var hann inntil í 1962, tá ið hann fór á keypmansskúla í Keypmannahavn. Eftir at hann í 1963 var afturkomin, arbeiddi Álvur eitt skifti hálva tíð hjá J. Michael Jacobsen og hin partin av tíðini í familjufyritøkuni. Pápin yvirtók handilin í 1967, og síðani var tað Álvur, sum tók við ábyrgdini.

Eftir at Álvur hevði yvirtikið handilin, bygdi hann um og út fleiri ferðir, og handilin vaks nógv. Álvur hevur verið sera nærlagdur og íðin og raskur handilsmaður. Eitt nú var handilin hjá honum, sum seinni árini hevur borið navnið Netto, kendur fyri at vera ein tann fyrsti á hvørjum ári at hava ræst kjøt og avroð og nakað seinni á heystinum at hava turt kjøt til sølu. Álvur keypti heilar gongur ymsa staðni kring landið, og hann stóð sjálvur fyri flettingini og upptøkuni. Hetta hevur hann lagt nógva orku í, og tað hevur verið vørumerkið hjá handlinum, at eisini hesar vørurnar skuldu vera fyrsta floks. At kundarnir hava verið trúgvir, hevur verið gott skoðsmál.

Álvur hevur altíð verið sera áhugaður í samfelagsviðurskiftum. Áhugan fyri politikkinum hevur hann arvað frá forfedrunum. Abbin á faðir síðuni, Óli í Skúla, umboðaði í mong ár Sambandsflokkin á tingi. Mammubeiggin, Jacob Johannes Matras á Viðareiði, var tingmaður fyri Sjálvstýrisflokkin í Norðoyggjum 1928-1932. Álvur umboðaði Sjálvstýrisflokkin í Klaksvíkar býráð nøkur ár fyrrapartin av sjeyti árunum, og 1981-1988 sat hann í skúlanevndini.

Í 1965 varð Álvur Klakk valdur í umsjónarráðið fyri Norðoya Sparikassa, og hann er framvegis nevndarlimur. Tey, sum hann hevur samstarvað við, bera Álvi, at hann hevur verið sparikassanum sera dyggur stuðul.

Álvur Klakk giftist í 1965 Elsy fødd Gaard og ættað úr Oyndarfirði. Hon er fødd 27. juli í 1937. Elsy og Álvur búgva úti í Klaksvík og harvið í umhvørvinum, sum Álvur hevur livað í so at siga alla sína tíð. Elsy og Álvur eiga trý børn. Anni, sum er fødd í 1966, býr í Syðrugøtu, Sjúrður, sum er føddur í 1967, býr í Klaksvík, og Karin sum er fødd í 1971, býr á Viðareiði. Álvur eigur fimm abbabørn.

Álvur eigur hús á Viðareiði, og har hava honum og konuni dámað væl at verið, tá ið tey hava hildið frí.

Álvur spældi í nógv ár fótbólt í KÍ, har hann var tryggur bakkur og fastur brotssparksskjútti. Hann hevur verið við til at vunnið nógv meistaraheiti. Í 1952 var hann á dreingjaliðnum, sum vann FM, og í 1953 og 1954 var hann á meðaldeildarliðnum, sum var meistari. Hesi árini var hann eykamaður á meistaradeildarliðnum, sum hevði vunnið FM í 1952 og aftur vann í 1953 og 1954. Fyrsta árið, Álvur var fastur maður á 1. liði, var í 1955, og hann var við til at vinna FM í 1956, 1957, 1958 og í 1961.

Álvur hevur verið uppi í nógvum felagslívi í Klaksvík. Frá miðskeiðis í fimmti árunum og inntil hann fór niður í skúla, var hann kassameistari hjá KÍ. Hann hevur verið ein av høvuðsmonnunum í Klaksvíkar Bridgefelag í mong ár, og hann hevur verið limur í Klaksvíkar Dansifelag, síðani tað varð stovnað. Teir eru fleiri, sum í sambandi við at teir eru farnir undir egið virki, hava kent ágóðan av vegleiðing og hjálpsemi frá Álvi Klakk.

Føðingardagin helt Álvur á Viðareiði saman við sínum næstu.

J

## Andlát og jarðarferðir

**Anna Joensen** úr Dúvugørðum, andaðist týsdagin 3. januar, 86 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin kl. 13.00. Jarðarferðin verður úr Saksunar kirkju leygardagin kl. 14.00.

**Óli Jóhan Samuelsen** fer frá kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi fríggjakvøldið klokkan 18:00 til frelsunarherin í Vági. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 13:30. Tey sum vilja minnast Óla kunna geva eina gávu til Frelsurnarherin í Vági; konto í Suðuroyarsparikassa.

### Dagurin í morgin

**6. januar. Trettandi dagur jóla**. Trettandi verður hildin til minnis um vísmenninar úr Eysturlondum, sum komu at tilbiðja nýfødda jødakongin. 6. januar var í fornkirkjuni hildin sum føðingardagur Krists og var róptur Epifania Domino (opinbering Harrans). Tá teir í 4. øld semjast um 25. desember sum føðingardagin, verður 6. januar trettandi dagur jóla.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

# Eg máli tað sum eg síggi

**Elin J. Smith býr í Danmark, men gevur nú føroyingum møguleika at síggja nakrar av málningum hennara**

LIST

*Rani N. Johannessen/Poul Hallur Davidsen*

Fríggjadagin 6. januar, kl.16 letur framsýning av Elin Jos. Smith upp í Smiðjuni í Lítluvík. Framsýningin heldur fram til mikudagin 11. januar.

Opið er allar dagar frá kl.14 til 19.30. Elin sýnir fram oljumálningar bæði nýggjar og eldri. Eisini eru sjey vatnlitsmálningar við.

Elin Josefina Smith er fødd 30. septembur 1964 í Sandavági, og er í dag 41 ár. Hon hevur altíð havt áhuga fyri málningalist. Sum 10 ára gomul byrjaði hon at tekna og sum 15 ára gomul byrjaði hon so at mála. Fyrsti málningur hon fekk, var ein málningur ið hon arvaði frá abba sínum og var hetta ein málningur ið Ruth Smith hevði málað av ommu Elin.

Í dag býr Elin í Miðjútlandi og er gift við tónleikaranum Kaj Klein, ið eisini er úr Føroyum. Hon starvast dagliga sum vikarur á einum dagrøktarstovni við 10 børnum. Hon málar onga fasta tíð ella dagar, men setur seg niður at mála inn í millum, tá hon hevur hug.

Tá hon setur seg at mála, hevur hon ikki langa tíð um ein málning, hon málar skjótt, men tað kann koma fyri at hon hevur fleiri mánaðir um ein málning, men sum oftast hevur hon ikki langa tíð um tað. Hon hevur heldur einki fast myndevni at mála eftir, hon málar tað hon heldur verða áhugavert, og tað kann verða frá natúruni á landi og líka niður til havbotnin við Atlantis.

Hon hevur havt millum 20-30 framsýningar bæði í Danmark og í Føroyum, og í løtuni hevur hon eisini eina framsýning í Hammel í Danmark. Hon veit ikki rættiliga hvar næsta framsýning hennara verður, men í 2007 verður hon við á eini framsýning í Skanderborg.



*Elin og Kaj hava listarligar gávur - hon sum málari og hann sum tónleikari*

*Mynd: Jens Kr. Vang*